Norðurlandaráðsins Bókmentavirðisløn verður handað:

# – Tankar um eina virðisløn og um bókmentir

**»Ein av teim goðu mátunum at merkja pulsin á norðurlensku samtíðini er at líta at bókmentunum. Tí her fær man svar upp á, hvussu vit hugsa og, hvat vit gera. Bókmentir eru tó ikki bert ein spegil av okkum sjálvum, tí tær kunnu nakað sum er heilt serstakt.«**

*Torben Brostrøm 1990*



*Kim Simonsen*

Nú skal vinnarin av Norðurlanda Ráðsins Bókmentavirðisløn 2004 finnast. Fyri Føroyar í ár er Jóanes Nielsen útnevndur fyri savnið: »Brúgvar av svongum orðum«, ið kom út í 2003. Í ár eru seks yrkingasøvn og seks skaldsøgur útnevndar í kappingini um tær 350.000 krónurnar og stóra heiðurin, ið kemur við hesi virðisløn, ið føroyingar bert hava vunnið tvær ferð í tey 42 árini, sum virðislønin hevur verið handað. Fríggjadagin verður vinnarin almannakunngjørdur á Christansborg á tíðindafundi.

Einar Már Gudmundsson tók til í 1990, hetta langt áðrenn hann sjálvur í 1996 vann hesa virðisløn, at um allan heimin biða børn tey vaksnu siga frá søgum, tí menniskjans hugur at hoyra søgur kann ongantíð mettast. Halldór Laxness tók eisini til, at tað at siga frá søgum er einki mótafyribrigdi, men liggur djúpt í menniskjans náttúru. Í søguni varðveitir menniskjan minnið og broytir hendingar til søgur og fakta til fiktión, soleiðis at fortíðin er saman við okkum í nútíðini. »Øll tíð er samtíð« tók T. S. Elliot til. Einki er meiri internationalt enn at skriva, at siga frá og tí eiga øll fólk á jørð allar bókmentir. Eingin eigur t. d. søgnir úr Ìslandi, ella tað sum Shakespeare skrivaði. Tó hava ymisk øki teirra lokalu mátar at tulka heimin. Tí betur er munur á t. d. norðurlenskum høvundum sum H.C. Andersen, William Heinesen, Tomas Tranströmer og Snorra Sturlusyni, tí munur er á londum, siðum og á tí tíð hesi livdu í, men tó er søguligi munurin á t.d. Snorra og Einari Már Gudmundsson ikki so stórur sum man heldur. Munurin á William Heinesen og donskum salmistum sum Kingo kann virka øgiligur, men er minni enn fyrsta eygnabráðið letur vita. Og høvundar sum August Strindberg, Knut Hamsun, Tom Kristensen og Halldór Laxness eru allir skildir við aðrar høvundar, og okkara tíðar høvundar sum oftast skildir við hesar. Tað er sum Einar Már Gudmundsson tók til, at hugflog og realisma eru tvær síður av somu søk. Ein realisma uttan hugflog er fløt og reint hugflog uttan realismu er bert møsn.

### Kappingin er sum vant hørð

Í ár eru seks skaldsøgur útvaldar. Úr Noreg kemur Roy Jacobsen við »Frost«. Úr Svøríki Kari Hotakainen við »Löpgrasvägen« og Steve Sem Sandberg við »Ravensbrück«. Úr Danmark er tað Vibeke Grøndahlsa »Det nye«. Úr Finlandi »Eriks Bog« eftir Lars Sund og úr Íslandi er tað skaldsøgan hjá Jón Kalman Stefánsson »Lite av varje om jättetallar och tid«. Ummælarin hjá Berlinske Tidende heldur at tað eru sera stórur góðskumunur á hesum skaldsøgum. Hann spyr polemiskt, um tað hevur verið nøkur tíð, har fólk hava verið minni áhugaði í hvørjum øðrum í Norðanlondum enn júst nú? Hetta heldur hann tó vera sera tápuligt og ímóti okkara veruligu náttúru. Serligani dámar honum væl skaldsøguna hjá norska Roy Jacobsen »Frost«, ið er ein søgulig skaldsøga frá árinum 933. Jens Andersen heldur eisini at skaldsøgan hjá finska Kari Hotakainens og svenska skaldsøgan hjá Steve Sem-Sandberg »Ravensbrück« eru góðar. Honum dámar tó ikki donsku Vibeke Grønfeldt, Lars Sund og ringaastu bókina metir hann bókina frá Íslandi hjá Jón Kalmar Stefánsson vera.

Í ár eru eisini seks yrkingasøvn útvald. Tey eru eisini sera ymisk. Ummælarin hjá Politiken Niels Lyngsø, ið sjálvur er ein (ikki serligani góður) yrkjari, helt at trý av hesum søvnum vóru góð meðan hini trý vóru vánalig. Honum dámar best norsku Inger Elisabeth Hansen, danska Peter Nielsen og svensku Kristina Lugn. Eg ivist ikki í at hesi er nøkunlunda góð, Peter Nielsen sigur mær tó ikki so nógv. Lyngsø heldur, at Inger Elisabeth Hansen er hin besta í bólkinum av hesum seks.








Ringast heldur hann hin grønlenska Kristian Olsen Aaju við savninum »Ordenes land«, hvørs bók »ikke er værd at kommentere«. Men hann er eisini sera firtin um savnið hjá Jóanes Nielsen, ið er: »…naivt, tilbageskuende, hyggeligt og enfoldigt«. Eg eri kki samdur við honum, og haldi at savnið hjá Jóanesi ikki er so vánaligt sum hann vil vera við. Mest ósamdur er eg við Lyngsø tá hann sigur, at íslenska Ingibjörg Haraldsdóttirsa savn »Vart än det bär« er naivt og keðiligt. Ummælarin vrakar søvnini úr Føroyum, Grønlandi og úr Ìslandi sum ein annar yvirlistadómari. Eg havi bert lisið brot úr grønlenska savninum og tað ljóðar óluksáligani vánaligt, so har hevur hann helst púra rætt. Savnið hjá Jóanesi er ikki tað besta frá hansara hond. Men eg haldi, at íslenska Ingibjörg Haraldsdóttir fær eina vána viðgerð. Savnið hjá henni er eitt av teim bestu eg havi lisið í 2003. Hesar yrkingar kunnu tykjast einklar og abstraktar, men stóra málsliga distansan boðar ein intensitet og ein fínan form fyri pathos og melankoli. Hetta er yrkjari, ið hevur týtt stórar yrkjarar sum Anna Akhmatova, Thomas Tranströmer og er skyld við stórar íslenskar modernistar sum Sigfus Dadason, Hannes Sigfusson og annars við Rilke og Celankenda málinum og forminum er hon ein góður modernaður yrkjari.



*Kim Simonsen er als ikki samdur við ummælaranum hjá Politiken, Niels Lyngsø, tá hann sigur um yrkingasavnið hjá Jóanes Nielsen, at tað er »…naivt, tilbageskuende, hyggeligt og enfoldigt«. – Savnið hjá Jóanesi ikki er so vánaligt, sum hann vil vera við, sigur Kim Simonsen*

Tað harmar meg at hin mangan so skilagóði Lyngsø ger sær so lítlan ómak sum yrkingarummælari, at hann vil samanbera seks ymiskar yrkjarar í einum lítlum ummæli, at hann ikki hevur verulig argument fyri tí hann sigur annað enn at Føroyar er eins lítið fólkað øki sum Ballerup uttan fyri Keypmannahavn. Hetta er absurd, eins og tað er at samanbera Danmark við Detroid ella Salt Lake City, tí fólkatalið kanska er tað sama. Ísland samanber hann við Århus. Men sum hann tekur feil. Einar Már Gudmundsson tók til um hetta, at »Stillet over for ånden er nationer hverken små eller store, og de største kulturelle bedrifter er tit blevet udført fjernt fra de egne, som regnes for jordens midte og verdens navle(…) Enhver tale om store nationer og små nationer, randområder, verdenshjørner, provinskultur og andet i samme dur er derfor først og fremmest udtryk for de herskende magtrelationer.« Menniskja livir á einari rundari gongustjørnu og miðan er har sum menniskja er, tí menniskja er miðan á jørðini, sigur Einar Már.

### Millum avantgardismu og meiri siðbundna realismu

Í norðurlenskum bókmentum er ikki nøkur serlig semja í løtuni. Torført er at hugsa sær eina tíð tá øll vóru samd, tí altíð er munur á høvundum. Ibsen og Brandes bardust báðir longu móti helmingin av tíðarinnar romantisku estetum. Í løtuni er ofta kjak um realismu, avantgardurørslur og postmodernismu, ið altíð endar sum eitt kjak um at skriva ein tápuliga samtíðarskaldsøgu ella eina ævisøgu. Bókmentablaðstjórin á Berlingske Tidende Nils Gunder Hansen skrivaði herfyri um bøkur, ið skuldu kappast á danska bókamarknaðinum um bókaprísin millum lesarar. Helvtin av hesum bókum vóru ævisøgur um t.d. H.C. Andersen, Henrik Stangerup og ein um danskan uttanríkispolitik. Restin eru bert søguligar skaldsøgur, ið eru sera vælumtøktar millum fólk, meðan kritikarar mangan dáma tær lítið. Fólkið lesur um siðsøgu og ævisøgur, meðan tær meiri smølu bókmentirnar klára seg illani á marknaðinum. Men hetta kemur eisini av at modernisman endaði sum ein myrk og fragmentera anæmisk og anorektisk stuttprosa. Høvdu fólk ikki vent sær frá tí fínaru avantgarduni fyrr komu tey at gera tað seinni. Í Føroyum kann man spyrja hvør tímir at lesa Carl Johan Jensensa bøkur, ella textir og ævigu ropini hjá Tórodda, ið tvær ferð um árið kunnger, at hann hevur skriðað sær í afturpartinum? Samstundis kom filmurin veruligani at gerast tað sum fólk tosa um og nærum hin fyrsta og fremsta listagreinin, ið just tordi at endurtaka eina stóra episka traditión, ið vit í Norðanlondum kenna frá t.d. William Heinesen, Halldór Laxness og Knut Hamsun. Filmurin kann og torir at taka støði í einum vanligum dagligdagi, á bygd og í bý, einum nútíðarveruleika, sum modernaðir bókmentafrøðingar sum Alain Robbe- Grillet og Roland Bartes hava roynt av avlíva, eins og Jean Paul Satre meintu hesir, at ein modernaða skaldsøga skal (skal hon vera »fín«) vera ein antiskaldsøga. Hetta hámodernistiska svartskygni, síggja vit nú góð fjøruti ár eftir hetta, hevði eina ávísa ávirkan. Skaldsøgur verða skrivaðar, men antin leggja tær sjógv millum formin og lesaran ella royna tær at tekkjast lesarinum ov nógv og ov týðuligt.

Í hinum endanum á norðurlenskum bókmentum hava vit sum sakt avantgardubókmentir, anti-romanir, textir og avantgardukritikarar sum t.d. Lars Bukdal sum er limur í bókmentafelaginum Øverste Kirurgiske. Her er ein óendalig eksperimentering. Einki er heilagt her. Húsayrkjarar her eru Per Højholdt, Simon Grotrian, Katrine Marie Guldager, Ursula Andkjær Olsen o.s.fr. Tað er kanska ikki so løgið, at fólk sum Per Højholdt ikke vera innstillaði ella vinna slíkar virðislønir, soleiðis sæð er henda virðisløn kanska meiri konservativ. Í Øverste Kirurgiske ella Ø.K. eru bókmentir meiri ein spurningur um stand-up komik, sum man sær hjá Jens Blendstrup, T.S. Høeg, Asger Schnack. Ø.K. hevur roynt at gjørt av við álvaran í bókmentum frá áttatiárunum, men mangan er lítið góðs í hesum dadaistisku og postmodernistisku provokatørum. Tóroddur átti kanska at søkt um upptøku sum skjótast.

### Í ár eru nógv góð nøvn

William Heinesen fekk hesa virðisløn, sum ein av teim fyrstu í Norðanlondum fyri skaldsøguna »Det gode håb«, men varð noyddur at deila virðislønina við Oluf Lagercrantz í 1965. Seinni hevur Rói Patursson fingi hesa í 1986 fyri modernaða savnið »Líkasum«, sum enn er ein nýklassikari innan føroyska yrking. Tá William fekk hesa virðisløn skrivaði hann eitt telegram til ein av nevndarlimunum: »Eg takki tær av mínum hálva hjartað«. Kanska William ikki var so nøgdur við at skula deila hendan heiður. Men hin vegin kunnu vit siga, at Lagercrantz er ein stór ond í norðurlenskum høpi. Læs herfyri bókina hjá honum kallað: »Om konsten att läsa och skriva«, har hann tók til, nakað sum enski yrkjarin Samuel Butler hevði sakt, spyr teg sjálvan hvønn týdning tað tú skrivar hevur um hundrað ár. Eitt annað ráð er at lesa hart fyri teg sjálvan, týðuligt og spakuligt. Tá sært tú hvar teksturin hevur sínar veikleikar.

### Tey størru londini vinna oftari

»Norðurlenskar mentanargjáir eru djúpari enn Kalveboderne og grynri enn Philippinaragrøvin. Amatørar og professionel berjast um rættin til ríkið. Góði viljin og kritiskur sansur eru ikki altíð í familju«

*Torben Brostrøm*

Søgan hjá hesi virðisløn er hon, at veikleikar verða mangan sæddir, og at flogvit fáa hesa virðisløn. Fara vit aftur í søguna hjá hesi nógv umrøddu virðisløn, so hevur Danmark vunnið 8 ferð tey seinastu 41 árini, seinast Henrik Nordbrandt, Pia Tafdrup, Dorrit Willumsen, Peter Seeberg. Longur afturi hava Villy Sørensen, Thorkild Hansen og Klaus Rifbjerg eisini vunnið. Svøríki hevur fingið hesa virðisløn flestar ferðir, bæði fyrstu ferð í 1962 tá Eyvind Johnson fekk hana og í 2003 tá Eva Ström fekk hana. Millum 1962 og 2003 hava sviar fingið hana 12 ferðir. Kend nøvn sum Gunnar Ekelöf, Per Olov Enquist, Tomas Tranströmer og Kerstin Ekman eru nærum sjálvskrivaði.

Noreg hevur vunnið virðislønina 8 ferð eins og Danmark. Eftir eru so 13 virðislønir sum Finland, Ìsland, Føroyar, Grønland kunnu berjast um. 7 av hesum virðislønum eru finnar farnir við. Ísland við 4 prísum og tvær til Føroyar, og tá fekk William bert eina hálva virðisløn. Grønland hevur ongantíð gjørt seg galdandi enn. Saman um tikið eru tað tey stóru Norðurlensku londini sum vinna oftari enn tey heilt smáu. Tað vil so vera, tað er helst longri millum eina góða bók úr Føroyum og Íslandi enn úr t.d. Svøríki.

### Norðurlond líkjast men bókmentir eru ymiskar

»…torført er at vera rættvísur, tí málsligar avmarkingar minka um gleðina við tí norðurlenska. Hvussu nógv skilja grønlenskt, íslenskt, føroyskt, finskt, tá vit nú mutla um felagsnorðurlenska tungu.«

*Torben Brostrøm*

Hetta er fjórða ferð Jóanes er útnevndur. Í føroysku nevndini fyri Norðurlanda Ráðsins Bókmentavirðisløn sita í løtuni lektarin og mag.art Jógvan Isaksen, lektarin og mag.art. Turið Sigurðardóttir og rithøvundin og týðarin Ebba Hentze.

Vit kunnu bert vóna, at tað gongur Jóanesi væl framyvir, og at Føroyar koma at menna seg innan yrking og prosa. Mangan haldi eg, at fólk í Føroyum mest munnhøggast og øvunda teim sum royna seg. Eg haldi, at tað er stóra æru vert at vit hava fínar yrkjarar sum Jóanes og onnur í Føroyum, men áhugavert er sjálvandi at síggja, hvat onnur meina um okkara heimligu yrkjarar og høvundar í norðurlenskum høpi.

: